1930. Symptomatiskt fyri støðuna í grannatjóðini fyri vestan tá í tíðini. Men sum amerikumaðurin Mark Kurlansky skrivar í bók síni um toskin – Fiskurin sum broytti heimin: "Táið íslendingar settu lýðveldið á stovn í 1944 var sáttmálin sum Danmørk gjørdi við Bretland 24. juni 1901, har bretum varð játtað fiskirætt inn at 3-mílamarkinum, sami sáttmáli var galdandi fyri Føroyar, sagdur upp. Eftir 550 ára danska vanrøkt av lunnindunum, tóku íslendingar støðu fyri at byggja upp ein modernaðan stat, grundaðan á teirra einasta veruliga tilfeingi – toskastovnarnar." Tá byrjaði stríðið fyri at tryggja lýðveldið búskaparliga. Matkovan á havleiðum landsins. Og eftir toskakríggj og nógvan trega fyri at vinna nationalu rættindini, var fiskimarkið til endans flutt út á 200 fjórðingar. Fyri at framtíðartryggja statin stjórna teir í dag fiskivinnupolitikkin samsvarandi tilráðingunum frá Havrannsóknarstovninum og ICES. Norðmenn gera tað sama í Barentshavinum. Vónandi eru vit ávegis á sama mót sum grannar okkara.

Toskaveiða og føroyskur búskapur fylgjast neyvt. Sum tvær analogar streymtalvur. Hóast stovnurin er illa fyri í løtuni, so sær ikki so svart út fyri framman kortini. Toskurin er eitt óvanliga fertilt individ. Hin vælkendi Loewenhoek taldi einaferð 9.384.000 egg í einum meðaltoski, tí ruddast hann ikki út, soleiðsni uttan víðari. Ein annar kendur maður, Alexandre Dumas, segði í 1873, at onkur skuldi hava roknað út, at um øll toskaegg uttan óhapp vórðu klakt, tá hevði ein eftir trimum árum kunnað gingið turrskøddur á toskaryggjum tvørtur um Atlantshavið.

Eftir hetta kuriosum er bert at siga, at tað er rætt og rímiligt, at veiðimaðurin vil hava so nógv rættindi og so mikið rásarúm sum møguligt. Hesin dynamikkurin er avgerandi fyri eina fiskivinnutjóð. Men eftir at heimshøvini eru avstikað og avmarkingarnar eru íkomnar, er tað skyldan hjá politiska valdinum at verja stovnarnar og halda stovnsrøktini í hevd. Seráhugamálunum eiga onnur enn landsstýrisfólk og tingmenn at taka sær av. Nú fæst so at vita, hvussu langt login frá lummalyktunum røkkur, men vælsignaði tit, nú ræður um búskaparliga at framtíðartryggja tjóðina og fylgja ráðunum í hesum uppskoti. Ferðina avgera tit, men prinsippið og nakað væl afturat, tað mega vit knæseta, táið uppskotið kemur aftur úr nevndini og skal avgreiðast endaliga.

